# ARBEIÐSBLAÐ 4

## UPPTØKUR OG KLIPP

Tit hava nú skrivað eitt einfalt leikrit, ið inniheldur í mesta lagið 3 orðaskifti á trimum blaðsíðum. Tit eru nú til reiðar at fara undir filmsupptøkurnar.

Her eru 3 góð ráð til upptøkurnar:

**1.** Haldið telefonina vatnrætt, so líkjast upptøkurnar meira filmi

**2.** Minnist til nærmyndir – harvið koma vit nærri inn á persónarnar og síggja teirra kenslur

**3.** Førkið myndatólið, so filmurin gerst dynamiskur og ikki virkar so støðugur

Góða eydnu.

***PREI OG HUGSKOT***

### 3 GÓÐ RÁÐ TIL KLIPPING

Tá tit leggja tykkara upptøkur í rætta raðfylgja í tíðarlinjuna í klippingarforritinum, hugsið so eisini um klippirútmu – hvussu long/stutt skulu tey einstøku brotini vera? Hvat skapar mest óhugna í mun til júst tykkara upptøkur?

Um tit arbeiða við krossklipping, umhugsið so um tit skulu økja um ferðina í klippunum, so hvørt sum tit koma fram til, har træðrirnir í handlingini savnast.

Gerið tykkum ómak við ljóðinum – og hugsi um at brúka 'cleansound' (tað ljóðið, sum er á staðnum, tá ongin sigur nakað) effektljóð og tónleik! Tit skulu minnast til at innstilla ljóðstøðið í mun til hvørtannað, og tryggja, at ljóðstøðið í tykkara upptøkum er so javnt sum møguligt – eisini tvørtur um tey ymsu klippini í filminum.

Vit mæla til, at tit klippa filmin í einum forriti, sum tit kenna. Tá tit eru liðug við at klippa, kunnu tit uppsenda tykkara ræðufilmsbrot til www.nordeniskolen.org



***VALFRÍ UPPGÁVA:***
Um tit hava møguleika fyri tí, kann tað vera eitt gott hugskot at arbeiða við eyka heimagjørdum ljóðeffektum. Tað kann gera tykkara ræðufilm eyka creepy.